## Um okkum

Ráðgevingin fyri føroyingar í Danmark er ein sjálvsognarstovnur.

Í Ráðgevingini arbeiða tveir royndir sosialráðgevarar, og okkara virksemi hevur eitt høgt fakligt støði.

Vit hava gjøgnum árini upparbeitt royndir og vitan innan tey ymisku økini. Okkara styrki er, at vit kunnu veita eina heildarráðgeving, ið ikki fæst aðrastaðni.

Ráðgevingin veitir fyrst og fremst ráð og vegleiðing í teimum spurningum og trupulleikum, tú hevur og virkar sum sambindingarlið millum teg og myndugleikar ella stovnar.

Tú kanst venda tær anonymt til okkara, eingin skráseting fer fram, og vit hava tagnarskyldu.

Ráðgevingin er ókeypis, og vit veita ikki peningaligan stuðul.

Tú kanst ringja, faxa, senda teldupost, koma persónliga ella vitja okkara heimasíðu, ið hevur nógvar hentar upplýsingar.

**Ráðgevingin**
**fyri føroyingar í Danmark**

Vesterbrogade 17 A
1620 København V

Tlf. 33 23 99 80
Fax. 33 23 92 34

radgevingin@radgevingin.dk
www.radgevingin.dk

Avgreiðslutíð:

| | |
|---|---|
| Mánadag | 11.30 - 15.30 |
| Týsdag | 11.30 - 15.30 |
| Mikudag | 14.00 - 18.00 |
| Hósdag | 11.30 - 15.30 |
| Fríggjadag | stongt |

# Ráðgevingin
## fyri føroyingar í Danmark

### Tilboð um ráðgeving og vegleiðing

## Hvat kunnu vit?

Hevur tú trupulleikar t.d. við samlívssliti, foreldramyndugleika, skifti av útbúgving og ikki veitst, hvar tú skalt byrja ella enda, kunnu vit tosa við teg um trupulleikarnar á føroyskum.

Vit kunnu hjálpa við upplýsingum um reglur og lóggávu, hjálpa við at sam-skipa og raðfesta, vísa á møguleikar, myndugleikar, stovnar og serfrøðingar, so tú kanst koma víðari.

## Lesandi

Ert tú lesandi,
kunnu vit til dømis vegleiða um:

- SU, hvussu nógv tú kanst fortjena
- Eyka SU til einligar uppihaldarar
- Barnatilskot til lesandi
- Ferðaískoyti
- Føroyafrádrátt, ið er ein serligur skattafrádráttur fyri føroyingar
- Varðveitan av skattskyldu í Føroyum

## Vanlig flyting

Tá tú flytir millum Føroyar og Danmark, eru nógvir spurningar, sum stinga seg upp, tí lóggávan er ymisk í báðum londunum.

Flytir tú til Danmarkar/Føroyar,
kunnu vit til dømis vegleiða um:

- Flyting
- Persónsnummar
- Sjúkratrygging/sjúkrakassa
- Bústaðarviðurskifti
- Boligsikring
- ALS/A-kassi
- Hernaðarskyldu
- Flyting av bili
- Pensjón
- Sjúkradagpening
- Skatt
- Frítíðarløn
- Eftirløn

## Børn

Um tú hevur børn,
kunnu vit t.d. vegleiða um:

- Barnafamiljuveiting
- Barnatilskot
- Barnapengar
- Barnaansing
- Barnsburðarfarloyvi

## Føroyskir sjúklingar

Vit ráðgeva og vegleiða føroyskum sjúklingum og teirra avvarðandi í sosialum viðurskiftum.

Ein sosialráðgevi frá Ráðgevingini er at hitta hvønn týsdag millum 10.00 og 15.30 á Sjúklingahotellinum Tórshavn.

Tit eru eisini vælkomin at venda tykkum til skrivstovuna hjá Ráðgevingini í Føroya-húsinum hinar dagarnar.

Vit kunnu eisini koma út á sjúkrahúsið til innlagdar sjúklingar.

Vit kunnu:

- Upplýsa um rættindi hjá sjúklingum
- Hjálpa við at útfylla umsóknarbløð til sjúkradagpening, pensjón, medisin, hjálpitól og meira
- Ringja ella skriva til stovnar og myndugleikar í Føroyum
- Práta um støðuna